

STÓRT EPLI. Tá ein havnarmaður hendan dagin tók epli upp í urtagarði sínum, kom hann fram á hetta stóra epliið. Tað vigar 650 g, er 9 cm breitt og 18 cm langt

Mynd: DimL/Jens Kristian

Tað skal løna seg at seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk

Lasse Klein

Lasse Klein, løgtingsmaður, hevur vegna Kristiliga Fólkaflokkin lagt uppskot fyri tingið um broytingar í skattalógini, sum hevur til endamáls at fáa gongd aftur á vinnuna.

Fólk, sum seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk skulu yvir eitt ávíst tíðarskeið kunna draga upphæddina frá á sjálvuppgávuni. M.a. verður hugsað um, at øll fólk, sum seta pening í eitt smápartafelag ella partafelag, skrásett í Føroyum, skulu kunna draga upp til 10.000 kr. frá á sjálvuppgávuni eitt einstakt ár og upp til 30.000 kr. í trý fylgjandi ár.

Eisini heldur uppskotsstillarin, at møguleikarnir fyri, at kommunur, sum hava møguligan tøkan pening, skulu hava møguleika at stuðla vinnuvirkjum á staðnum – kortini við ikki meira enn 10% av partapeninginum – eiga at verða kannaðir.

Eisini feløg á arbeiðsmarknaðinum, sum hava fleiri milliónir krónur til ymisk endamál, eiga at fáa møguleika at brúka partar av sínum peningi til hetta endamál.

Hetta kundi t.d. verið gjørt á tann hátt, at feløgini læna pening til limir sínar, sum arbeiða á virkjum, sum á henda hátt fáa møguleika at seta partapening í virki. Upphæddin skal gjaldast feløgunum aftur eftir góðkendari reglugerð.

Mælt verður til at taka upp samráðingar við vinnufeløgini um hesar spurningar.

Eitt slíkt uppskot kemur helst í fyrstu syftu at kosta landskassanum pening, men endamálið við tí er, at økta virksemið skal fíggja missin.

Viðmerkingar

Oljufyrisitingin og Gomlu Bókasavnshúsini

Herfyri kom Martin Næs, landsbókavørður, við einum sera skilagóðum íkasti til orðaskifti um tey gomlu bókasavnshúsini, sum ætlanin nú er at nýta til oljufyrisitingina.

Sosialurin hevur tikið evnið upp í oddagrein í dag. Heldur ikki hann heldur skil verða í hesi avgerð. Satt at siga, so havi eg ikki møtt einum menniskja her á landi, sum eg havi tosað við,ið skilur hesa avgerð, hvør so tikið hana hevur. Tí tað mugu finnast fleiri hóskiligari hús enn gomlu bókasavnshúsini, ið kunnu ímynda Føroyar sum oljuland.

Verið tað mær tí loyvt at tríva aftur í eitt hugskot, sum var frammi, meðan Marita Petersen enn var landsstýrismaður í skúla- og mentamálum. Ein dag var eg saman við stovnaleiðarunum fyri Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið boðin til fundar í landsstýrinum. Á hesum fundi var skotið upp at kanna møguleikarnar fyri, at Føroya Fornminnissavn flutti framsýningar sínar niðan í gamla Listaskálan – hugsanin var at skulpturellu føroysku bátarnir vildu taka seg væl út millum onnur listaverk. Náttúrugripasavnið skuldi fáa alt Neystið ella Bátasavnið til sínar framsýningar. Gomlu bókasavnshúsini skuldu í framtíðini koma at verða høvuðsbyggningur hjá Fróðskaparsetri Føroya. Vit hildu eftir fundin, at nú fór okkurt skilagott at henda og fóru glaðir heim. Hetta var kortini, sum so ofta, av ymiskum orsøkum av ongum.

Satt at siga, so kunnu tað ikki vera fleiri meiningar um, at hábærsligi grótbygningurin hevði verið ein bæði sømiligur og bæriligur høvuðsbygningur hjá okkara lítla universiteti. Eg rokni við, at teir, sum í síni tíð reistu bókasavnshúsini, høvdu dámað hetta sera væl – tað hevði verið í teirra anda at nýtt gamla mentanarmiðdepilin til universitet. Eg eri eisini vissur í, at teir frá tí staði, teir nú eru, høvdu ynskt alt gott yvir tann landsstýrismann, ið tók eina slíka avgerð.

Meðan Thomas Arabo m.a. var landsstýrismaður í skúla- og mentamálum komu ein dag, sum snarljós av klárum himli, harraboð úr landsstýrinum um, at setrið skuldi flyta úr hølum sínum innan tvær vikur, tí Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði brúk fyri hølunum, men tað var ongastaðni at fara, tí varð heldur ikki flutt. Nú, langt um leingi, hevur setrið fingið boðið eini gomul sethús, sum DGU fyrr hevur húsast í. Tey skulu setast í stand fyrst, men ráðini til hetta tykjast at vera ógvuliga smá.

Rætt skal vera rætt, táverandi landsstýrismaðurin Thomas Arabo segði seg tá eisini av fullum huga at arbeiða fyri, at gomlu bókasavnshúsini skuldu koma at verða høvuðsbygningur hjá Fróðskaparsetri Føroya.

Síðani vit høvdu fundin við Maritu Petersen á sinni, er tað hent, at Føroya Fornminnissavn er flutt í húsini hjá Málingahandlinum í Hoyvík. Enn er tí ikki ov seint at reka aftur á aftur, og at taka ta avgerð, sum tá var hildin at vera skilagóð, og sum politikarar tá søgdu seg at arbeiða fyri.

Lat tað at enda verða sagt, at hetta ikki er skrivað fyri at leggja fót fyri Oljufyrisitingina ella fyri virksemi har. Tað vildi verið beinleiðis tápuligt. Teimum verður ynskt alt tað besta. Eitt er vist, at er olja í undirgrundini, so verður ráð til onnur hús til oljufyrisitingina. Heldur ikki er hetta skrivað fyri at skapa tvørleikar fyri Náttúrugripasavnið, men fyri at taka lut í tí orðaskifti, sum nú er reist um hesi hús. Hvør tíð hevur síni sjónarmið.

Jóan Pauli Joensen,
rektari á
Fróðskaparsetri Føroya.

Heystmótin í mynstri

Tey, sum sjálvi duga at seyma, hava góðar dagar

BEATE L. JENSEN

Tað eru ikki øll, sum hava nóg mikið av peningi at keypa sær klæðir, so fylgjast kann við mótanum.

Tískil kann tað vera ein stórur fyrimunur at duga at seyma sjálvur og kanska eisini seyma nýtt plagg burturtur gomlum, um tað liggur fyri.

Hinvegin er úrvalið av toyi í meturmáli sera stórt í summum handlum t.d. Skálabúðini, sum lýsir við stórum úrvali av mynstri aðra staðni inni í blaðnum í dag.

Við at seyma sjálvur kann ein lættliga seta sín persónliga dám á plaggið og harvið hava nakað, sum onnur kanska ikki hava.

Plagg uttaná plagg

Litirnir í heyst og í vetur eru reyddligir, settir saman við brúnum, svørtum, gráum, bláum og nátúrlitum.

Mótin sigur somuleiðis plagg uttaná plagg, japanskt snið við viðum tunikum og leysum brókum, ið fær ein at hugsa um folklore-pløgg.

Vesturin heldur sær innan heyst- og vetrarmótan í ár, og kann hann vera sera hentur at hava til at taka.

Dygdin av toyi er í vetur tweed, skinn og silki umframt ullint av ymsum slag.

Nøkur fá hugskot til mótan, sum ein sjálvur kann seyma sær

Leggið tær smáu kommununurnar saman við teimum størru

- Eg ivist ikki í, at eitt storri forum - ein størri kommunal eind, hevði fort til, at vit fingu betri skipaði viðurskifti ifleiri av teimum smáu bygdunum og meira demokrati, skrivar Petur Skeel Skarðsá, bygdarráðslimur í Funningi, í hesi greinini.

Undirritaði er av teirri áskoðan, at fleiri av teimum smáu kommununum í landinum áttu at verið lagdar saman við teimum størru kommununum.

Eg trúgvi, at hetta hevði havt fleiri fyrimunir við sær fyri allar partar - eisini fyri teir borgarar, sum í dag búgva í teimum kommununum, ið teljast millum tær smáu.

Ja, vit høvdu snøgt sagt fingið meiri av skafti í teimum smáu kommununum enn í dag.

Royndirnar her hjá okkum visa, at ert tú í minniluta, so er nærmast ógjørligt at fáa nakað igjøgnum.

Vit eru fimm fólk í bygdarráðnum í Funningi, vald átveimum listum.

Tey try, sum øll upprunaliga eru avbygdafólk, sita imeiriluta, meðan vit, sum eru haðani úr Funningi og uppvaksin í bygdini, eru í minniluta.

Leggjast skal tó aftrat, at tveir av limunum í meirilutanum, hava buð her í nógv ár.

Hinvegin eru fá ár síðan, at núverandi formaður flutti norður higar - úr Havn.

Sum eg nevndi, so meini eg avgjørt, at tær smáu kommununar skuldu verið tiknar av og lagdar saman við teimum stóru.

Eg ivist ikki í, at eitt størri forum - ein størri kommunal eind, hevði fort til, at vit fingu betri skipað viðurskifti í fleiri av teimum smáu bygdunum, enn vit hava í dag.

Meiri skil hevði komið í kommunal politiska arbeiði, og vit høvdu eisini fingið regluligari fundir og meiri demokrati, har boðskapurin hjá andstøðuni í størri mun varð hoyrdur.

Sum er, hava vit, sum sita í andstøðu, lítla og onga ávirkan á arbeiði í bygdarráðnum. Ja, vit hava ilt við at fáa okkara viðmerkingar førdar í gerðabókina, tá ið ynski verður sett fram um tað í sambandi við kommunala arbeiði.

Eitt annað, sum talar fyri at leggja tær smáu kommununar saman við teimum størru, er, at tá høvdu borgararnir í teimum smærri bygdunum eisini fingið høvið at møtt til almennar bygdaráðs- og byráðsfundir og hoyrt, hvat teir einstøku limirnir hava at bera fram.

Og hetta hevði ikki verið annað enn rimiligt, tí tað eru jú skattgjaldararnir - meiri ella minni vit øll, sum í síðsta enda noyðast at hanga uppá fleiri av teimum skeivu avgerðunum, sum tiknar verða á slikum fundum.

Mitt uppskot er tí stutt og greitt; leggið tær smáu kommununar saman við teimum størru, so vit fáa størri kommunalar eindir í Føroyum og harvið fleiri fyrimunir fyri okkum borgarar á smáplássunum.

Petur Skeel Skarðsá,
Funningur

NÁTTÚRA OG VIRKSEMI

Orð/foto PHJ

Hvussu nógvar myndir, ið eru tiknar av gjónni, er tað nokk eingin, ið veit; her er so ein av teimum. Onkur hevur sagt tað soleiðis, at tað er tað einasta, gjógvin kann brúkast til – lendingin skuldi verið niðri í fjøruni og tað fyri nógvum árum síðani.